# 90% av bygdarfólkinum skriva undir

**- Vit eru sera væl nøgdir við undirtøkuna, sum »borgarakravið« hevur fingið millum bygdarfólkið í Leirvík, siga Filip Hansen og Sørin Lisberg, sum tóku stig til at savna inn undirskriftir í Leirvík**

BORGARAKRAV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánadagin verða undirskriftirnar, sum savnaðar eru inn í Leirvík seinastu dagarnar, handaðar bygdarráðsformanninum í Leirvík, Sjúrða Eliasen og landssýrismanninum í vinnumálum, Bjarna Djurholm.

Tað vóru teir báðir, Filip Hansen og Sørin Lisberg, sum tóku stig til at savna inn undirskriftir til tess at mótmæla ætlanunum at lata Norðoyatunnilin upp fyri ferðslu, áðrenn loysn er fingin á ferðsluviðurskiftunum í Leirvík.

Løgtingið hevur samtykt eina tunnilsætlan undir Leirvík, men hendan er so leystliga orðað, at eingin veit við vissu, nær ætlanin verður framd í verki.

Í samtyktini stendur, at forkanningar í samband við tunnil undir Leirvík skulu verða gjørdar í seinasta lagi ár 2005, og síðan skal landsstýrismaðurin leggja fram uppskot fyri løgtingið um málið.


*Tað vóru teir báðir, Filip Hansen og Søren Lisberg, sum tóku stig til at savna inn undirskriftir í Leirvík.*
*- Undirtøkan hevur verið ógvuliga góð, siga teir báðir.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Stór undirtøka

Filip Hansen og Sørin Lisberg siga, at higartil hava eini 350 fólk skrivað undir, men enn eru eini 30 hús eftir, sum vit ikki hava verið í.

- Vit eru sera væl nøgdir við undirtøkuna. Fólk hava tikið væl ímóti okkum, og eini 90% av teimum spurdu hava skrivað undir.

Teir vísa á, at 636 fólk í Leirvík hava valrætt, so longu nú hevur meira enn helmingurin av teimum, sum hava atkvøðurætt, skrivað undir.

- Tey flestu, sum hava skrivað undir mótmæli, eru 25 ár og eldri. Torført er at finna fram til ungdómin í bygdini, tí hann er stóran part av degnum av bygdini í skúla, í læru, til arbeiðis umframt at nakrir ungir menn sigla.

Filip og Søren vænta, at eini 180 fólk, sum hava atkvøðurætt í Leirvík, á ein ella annan hátt eru burtur og tískil ikki fáa høvi at skriva undir.

Øll, sum hava skrivað undir »borgarakravið«, taka undir við, at ferðsluviðurskiftini í Leirvík verða loyst, áðrenn Norðoyatunnilin letur upp. Tey krevja eisini, at Leirvíkar bygdarráð tekur upp nýggjar samráðingar við landsins myndugleikar um málið.

### Eingin negativur

Stigtakararnir siga, at fólk hava verið blíð og fyrikomandi, tá ið komið verður á gátt við mótmælisskrivinum.

Spurdir, um bygdarráðslimir hava funnist at mótmælisskrivinum, sum seinastu dagarnar er farið runt í bygdini, siga teir, at tað hava teir ongan varhuga av.

- Nei, vit halda, at tað er tvørtur ímóti. Vit halda eisini, at tey, sum sita í bygdarráðnum, eru fegin um, at tey nú kunnu hava hetta skrivið at fara til myndugleikarnar við.

Filip og Søren siga, at ætlandi verður skrivið liggjandi á Statoil-støðini í Leirvík til sunnudagin og í handlinum hjá Rasmusi í dag aftrat.

Síðan verða undirskriftirnar handaðar bygdarráðsformanninum og landsstýrismanninum í vinnumálum mánadagin.

### Nýggjar samráðingar

- Vit vóna, at mótmælisskrivið fer at føra til, at nýggjar samráðingar um loysn at ferðsluviðurskiftunum í Leirvík verða millum bygdarráðið og landsins myndugleikar, soleiðis at ein endalig loysn er funnin, áðrenn Norðoyatunnilin letur upp.

Filip Hansen og Søren Lisberg siga seg eisini vóna, at landsins myndugleikar skilja óttan í Leirvík fyri øktu ferðsluni sum verður, tá ið Norðoyatunnilin letur upp.

- Tað kann væl ikki vera meira enn rímiligt, at vit í Leirvík vilja hava hesi viðurskifti uppá pláss, soleiðis at livandi verður í bygdini – eisini eftir, at Norðoyatunnilin er latin upp, siga teir báðir.

# Leirvíkar bygdarráð staðfest samtyktina um tunnil

**Samstundis heitir bygdarrráðið á landsstýrismannin í vinnumálum um at almannakunngera tíðarætlanina fyri arbeiði at gera tunnil í Leirvík og at gera greitt, hvussu peningurin verður settur av á fíggjarlógini**

FERÐSLUVIÐURSKIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á bygdarráðsfundi í Leirvík, 6, oktober, samtykti eitt samt bygdarráð at staðfesta avgerðina um tunnil í Leirvík, sum bygdarráðið tók í mars 2002.

Samstundis heitir bygdarráðið á landsstýrismannin í vinnumálum um at almannakunngera tíðarætlanina fyri arbeiði at gera tunnil í Leirvík og at gera greitt, hvussu peningurin verður settur av á fíggjarlógini.

Í samtyktini sigur bygdarráðið eisini, at av teimum fýra tunnilsføringunum, sum Landsverkfrøðingurin hevur lagt fyri bygdarráðið, er bygdarráðið samt um, at arbeiðast skal víðari við sonevndu »reyðu« loysnini, sum er tann fyrsta, ið Landsverkfrøðingurin kom við.

- Portalurin til henda tunnilin er nakað áðrenn Mataránna niðan av Hebron og kemur útaftur í eina rundkoyring beint norðanfyri Statoil-støðina í bygdini.

Í samtyktini vísir Leirvíkar bygdarráð eisini á, at Landsverkfrøðingurin í samband við framløguna av hesum máli legði serligan dent á, at »einki kann byggjast í einum geira á 60 metrar eftir tunnilslinjuni, fyrr enn tunnilin er liðugur. Heldur ikki kann nakað spreingiarbeiði fara fram eftir geiranum, tá ið tunnilin er liðugur.

Leirvíkar bygdarráð heitir í Vinnumálaráðið um at útgreina hesar ásetingar.



# Læknar hótta við fleiri uppsøgnum

**Kommunulæknar í høvuðsstaðnum vilja vera við, at fleiri læknar fara at siga seg úr starvi, um ikki kommunan velur ávísa telduskipan til teirra. Jan Christiansen, borgarstjóri, sum hellir til eina aðra loysn, letur seg ikki stýra av hóttanum**


*Trýstið er høgt hjá kommunulæknum í Havn í hesum døgum. Ein holmgonga um telduskipanina hevur fingið ein at siga upp, og aðrir hótta við at fara sama veg*
*Mynd: Jens K. Vang*

LÆKNASTRÍÐ
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Har ein skriða er lopin er onnur væntandi, verður sagt. Vónandi kann hendan orðingin ikki flytast á kommunulæknastríðið í Havn. Men okkurt bendir á tann bógvin.

Kommunulæknar, sum Sosialurin hevur tosað við, siga, at tekur Tórshavnar býráð avgerð um, at íslendska skipanin SAGA verður sett í verk hjá kommunulæknunum í Havn, so fara fleiri læknar úr starvi afturat. Sosialurin veit um ein, sum við vissu fer, og ein, sum umhugsar tað. Harafturat skulu aðrir eisini hava sagt tað.

Tann fyrsti er longu farin. Kaj Kallsberg hevur boðað frá, at hann leggur frá sær, tí arbeiðsbyrðan er ov stór, og ein orsøk til tess er nógv umrødda telduskipanin til læknarnar, sum enn ikki er komin.

Bíðað hevur verið eftir telduskipanini í nógv ár. Tveir læknar hava royndarkoyrt eina íslendska skipan, nevnd SAGA, sum er lagað til føroysk viðurskifti, men hóast hesir læknar eru væl nøgdir við skipanina, tvíhalda allir hinir átta kommunulæknarnir í kommununi um, at teir vilja hava donsku skipanina MedWin.

### Hugaður fyri SAGA

Nú boðar býráðsformaðurin í Havn frá, at ein loysn er á veg, og ein loysn verður funnin, áðrenn hetta árið er úti. Men tað verður neyvan tann loysnin, sum gongur meirilutanum av læknum í Havn á møti.

– Persónliga helli eg til SAGA-skipanina, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn. Eg havi fult álit á teimum læknum, sum hava roynt hana. Og eg haldi, at vit skulu hava einfaldar loysnir. Tað undrar meg stórliga, at læknar, sum sjálvir ongantíð hava roynt MedWin, skulu tvíhalda um hesa skipanina, hóast tveir læknar hava royndarkoyrt SAGA, sum er lagað til føroysk viðurskifti, og hava verið sera glaðir fyri hana, sigur Jan Christiansen.

Í somu vending ger hann vart við, at tað snýr seg ikki um, hvat hann sjálvur heldur. Hann byggir á eina samtykt í býráðnum, sum sigur, at skipanin skal samskifta við aðrar skipanir í heilsuverkinum. Ta treytina lýkur SAGA, siga tey, sum hava roynt hana.

### Konfrontatión

Alt bendir sostatt á eina konfrontatión. Millum tvær telduskipanir. Millum kommunulæknar. Og millum býráðið í Havn og teir læknar, sum sigast at fara úr starvi, um býráðið sker ígjøgnum og velur SAGA-skipanina.

Jan Christiansen sigur seg ikki kenna til eina hóttan um fleiri uppsagnir frá læknum. Tað kann hann ikki brúka til nakað kortini.

– Eg kann ikki handla út frá hóttanum. Skuldi tað hent, at teir veruliga meina tað, so hava teir ein forkláringstrupulleika. Fara teir bara tí, at teir ikki fáa sín vilja? Ella hava teir nakað fakliga at vísa á? Er tað tað seinna, so vil eg sjálvandi lurta. Men eg kann ikki boyggja meg fyri einum harramentaliteti frá einum ávísum bólki. Sum politikarar noyðast vit at velja loysnir, sum tæna heildini. Læknar kunnu hugsa um seg sjálvar, men vit noyðast at hugsa um øll, sigur Jan Christiansen.

Hjá býráðnum er tað eitt krav, at skipanin hjá kommunulæknum skal samskifta við sjúkrahúsini, heimarøktina, heilsurøktina, apoteksverkið, Almannastovuna og sjúkrakassarnar. Kanska liggur lykilin til orrustuna grivin har.

### Egnar leiðir

Fólk standa helst púra óskiljandi og hyggja at, meðan kommunulæknarnir í Havn eru farnir í tvíningar av berari telduøsing.

Men tað eru eisini læknar, sum hava fingið nokk. Andor Ellefsen, sum annars er millum teirra, ið hevur biðið um MedWin-skipanina, hevur bakkað út. Hann hevur valt sína egnu skipan, sum hvørki er MedWin ella SAGA, og tað gongur fínt, sigur hann.

– Tað er eingin skandala, um vit hava hvør sína skipan. Soleiðis er tað eisini aðrastaðni. Eg fari so ikki úr nøkrum starvi vegna stríð um eina telduskipan. Eg havi bygt mína egnu skipan upp, og tað er eingin trupulleiki, sigur Andor Ellefsen.

### Teldumálið

MedWin ella SAGA. Tað er spurningurin, sum skilir kommunulæknar í Havn fyri tíðina. Býráðið skal í næstum taka støðu til, hvørja telduskipan, læknarnir skulu hava. Sjey av níggju læknum krevja, at teir fáa donsku skipanina MedWin. Teir báðir kommunulæknarnir, sum hava roynt íslendsku skipanin SAGA, ið er tillagað føroyskum viðurskiftum, eru heit talsfólk fyri henni. Men hinir vilja ikki hoyra talan um SAGA. Ein lækni hevur sagt upp, m.a. av hesum ávum. Og nú hótta aðrir við at fara sama veg, um teir ikki fáa sín vilja.

MOBALPA
K Ø K A R

Opið hús: Leygardagin kl. $10^{00}$ - $18^{00}$
Sunnudagin kl. $14^{00}$ - $18^{00}$



damor
Kvíggjartún 3 · 160 Argir
Tel. 315 415 · Fax 319 001

